## Fleiri um boðið

Tað stendur ikki á at finna evni til tað komandi forsetaembætið í Evropasamveldinum. Bretska stjórnin hevur boðað frá, at hon vil hava fyrrverandi forsætisráðharran Tony Blair til ES-forseta, og í gjár segði forsætisráðharrin í Luksenburg, Jean-Claude Juncker, at hann ætlar at bjóða seg fram. Við franska blaðið Le Monde segði Juncker, at verður hann spurdur, fer hann at taka av. Juncker segði seg ikki hava nakað ímóti Tony Blair, men vísti á, at Bretland er hvørki i í Schengen ella evrusamstarvinum.



## Fleiri hermenn til Afghanistan

Í USA hevur Barack Obama, forseti, gjørt av at senda fleiri amerikanskar hermenn til Afghanistan. Men sambært New York Times ætlar forsetin, at hermenninir skulu býtast sundur í tíggju eindir, sum skulu hava støð í ávísum pørtum av landinum, har høvuðsuppgávan verður at verja sivilfólkið ímóti álopum. New York Times skrivar, at hendan framferðin er ein týðilig ásannan av, at NATO-herdeildirnar eru ikki førar fyri at gera av við Taliban. USA hevur nú 68.000 hermenn í Afghanistan, men tann ovasti generalurin, Stanley McChrystal, hevur biðið um at fáa 40.000 afturat.




*- Tað einasta rætta er at føroysku peningastovnarnir verða lagdir undir trýst fyri at tvinga teir at lækka rentur og ómaksgjøld, sigur Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður*

# Føroyskir bankar skulu leggjast undir hart trýst

**Tað einasta rætta er at gera ein almennan stovn, sum kundi fíggja sethús, so at bankarnir fingu veruliga kapping og ikki sluppu at seta rentur og ómaksgjøld, sum tað passar teimum, staðfestir Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum**

FÍGGJARVIRKSEMI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Bankarnir í Føroyum áttu at verið lagdur undir trýst.

Tað heldur Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Hann heldur tí, at tað hevði verið eitt gott hugskot at skipa ein almennan stovn, sum kundi tikið kappingina upp við bankarnar um at fíggja sethús fyri fólk.

- Bankarnir høvdu havt gott av veruliga at merkt, hvat tað merkir at hava kapping á fíggingarøkinum.

### Føroyskir bankar friðaðir

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum heldur nevniliga, at peningastovnarnir í Føroyum arbeiða í eini vardari ostaklokku, har teir hava fullkomiliga valdið á viðskiftafólkunum, hóast teir als onga kapping hava yvirhøvur.

- Peningstovnarnir í Føroyum eru fáir, men tey viðskiftafólk, sum ónøgd við tænastuna, hava onga aðrastaðni at fara.

Og hann heldur, at hetta høvi brúka bankarnir til at tiltuska sær nógv hægri rentu og ómaksgjøld, enn rímiligt er.

Avleiðingin av tí er, at vit í Føroyum hava væl hægri rentu og ómaksgjøld enn bankarnir í londunum rundanum okkum, taka.

Men hann skilir teir væl, tí teir royna sjálvandi at fáa so stóran vinning til íleggjararnar sum gjørligt.

- Men tí heldur hann, at tað hevði verið eitt gott hugskot, at tað almenna kom upp í leikin og skipaði ein stovn, sum kundi kundi givið bankunum eina veruliga kapping um viðskiftafólkini.

Hann hugsar her um, at vit hava tveir almennar stovnar í Føroyum, sum kunnu brúkast til endamálið.

- Vit hava Húsalánsgrunnin, sum kann brúkast til endamálið og vit hava Realin, har viðtøkurnar kunnu broytast, so at hann eisini kann veita realkredittlán til íbúðarfígging.

### Ein bóltur á politiska himmalin

Jóannes Eidesgaard staðfestir kortini eisini, at hetta skal ikki uppfatast sum annað og meiri enn eitt hugskot og ein bóltur, hann tveitir upp í politiska himmalin til umhugsunnar.

Hetta er sostatt hvørki nakað, sum samgongan hevur á radaranum, ella sum stendur serliga frammaliga á hansara egnu arbeiðsskrá.

Hann hevur heldur ikki umrøtt málið við aðrar flokkar.

- Eg vænti ikki, at vit høvdu fingið meiriluta fyri einum slíkum hugskoti í hesi samgonguni, men hvat kann koma upp á tal í eini aðrari samanseting, veit hann ikki.

Men eg haldi, at tað kundi verið eitt hugskot, at tað almenna kom upp í leikin og gav bankunum ein skarpan gang á útlánsøkinum við at geva viðskiftafólki góð tilboð um sethúsafígging.

Men nú er støðan tann, at tað almenna átti bankarnir, men teir skuldu partú einskiljast. Hví so ikki bara varðveita bankarnar á almennum hondum?

- Ja, tað hevur verið politiska rákið, at bankarnir skuldu einskiljast, tí tað almenna skuldi ikki fáast við bankavirksemið. Trupulleikin er bara tann, at føroysku fíggjarstovnarnir eru so avbyrgdir, at teir hava onga kapping og tí kunnu teir seta rentur og ómaksgjøld, akkurát sum tað hóvar teimum.

## Bankar mergsúgva bæði vinnuna og húsaeigarar

**Nógvir politikarar úr fleiri flokkum eru sera misnøgdir við útlánspolitikkin hjá føroysku bankunum**

RENTUSTØÐIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Jóannes Eidesgaard er langt frá einasti politikari, sum er misnøgdur við útlánaspolitikkin hjá føroysku peningastovnunum.

Sum tað sæst í hinari greinini her á síðuni, heldur hann, at tað einasta rætta var, at tað almenna bjóðaði bankununum av.

Men bankarnir hava javnan verið umrøðuevni á Løgtingi og har hava politikarar úr fleiri flokkum funnist hvassliga at bankunum fyri at taka ov høga rentu, bæði frá vinnulívi og frá sethúsaeigarum.

Ein av teimum er sjálvur landsstýrismaðurin í vinnumálum, sum hevur staðfest, at vinnan bløðir út tí bankarnir rætt og slætt mergsúgva hana við teirri høgu rentuni og hann heitti á bankarnar um at uppføra seg ”anstendugt”, sum hann málbar seg.

### Ikki ov høgt

Hinvegin hava bankarnir aldrin viðurkent, at rentan er óneyðuga høg.

Teir hava ferð eftir ferð ført fram, at orsøkin til at rentan og ómaksgjøld eru, sum tey eru, er tann, at tað er dýrt hjá teimum at vera við í bankapakkanum, sum tryggjar. føroyska samfelagnum neyðuga fígging til samfelagið, eisini við realkredittlánum, sum útvegar føroyskum sethúsaeigarum lán til munandi bíligari rentu.

Tað er eisini dýrari at hjá bankunum at læna pening úr øðrum bankum og alt tað førir til hægri rentur.